## inni - trygt og ómaksleyst til hús



### Sethús – Húsagøta 19, Kollafjørður

Hugnaligu húsini eru í tveimum. Hartil er hjallur og úthús (gróthús). Annað húsið er 38,8 og hitt 22,8 í alt 61,6 $m^2$. Húsini kunnu byggjast saman. Grundøkið er 453 $m^2$. Upprunaliga byggiárið er 1797, men alt er bygt um og av nýggjum í 1992 so sum veggir, gólv, rør, el, frárensl, vindeygu o.a. Í øðrum húsinum er inngongd, durur, køkur, stova, kamar, baðirúm og eitt lítið kamar / hemsur yvir stovuni. Í hinum er inngongd, fýrrúm / vaskirúm og nýtt baðirúm. Húsini standa í náttúruvøkrum, friðarligum, veðurgóðum og barnavinaligum umhvørvi, nær við barnagarð, skúla, kirkju, samkomuhús, læknahús, handil, bankar, býbuss til Havnar. Frálíkt útsýni er yvir bygdina og fjørðin.

**Prísuppskot : 700.000,00 kr.**



### Sethús Kristiansgøta 41, Hoyvík

Sera dámliguligu og hugnaligu húsini eru í 2 hæddum – niðara hædd er 102,5 $m^2$ og ovarar hædd er 63,5 – í alt 166 $m^2$. Hartil er garaga á 12 m2 og drívhús – pavillion á 12 $m^2$. Grundøkið er 608 m2. Byggiár: 1991. Í niðaru hædd er inngongd, bryggers, klædnarúm / garderoba, hjúnarrúm við baðirúmi, trappurúm, køkur / alrúm og borðsstova / stova við útgongd til útigólv / terassu. Í ovaru hædd er trappupallur / trappugongd, klædnarúm, baðirúm og 3 kømur. Runt húsini er garður / hugnaligur urtagarður við beðum, lampum og góðari mold. Húsini standa í friðarligum, veðurgóðum og barnavinaligum umhvørvi við blindan veg og hava sera góðan sólargang og nakað av útsýni. Dagstovnur, skúli, spælipláss, fótbóltsvøllur, kirkja, samkomuhús og nýggja handilsgøtan er nær við, og busssamband er beint yvir um vegin.

**Prísuppskot 2.8 milliónir kr.**



### Sethús – Norðuri í sundinum 19, Kollafj.

Hugnalig gomul sethús í trimum hæddum við garasju, húsini eru bygd uml. 1900, stødd uml. 42 fermetrar hvør hæddin + garasja. Á miðhæddin er, gongd, trappa upp til loft, baðirúm við brúsu, køkur og spísi/sitistova út í eitt. Á loftshæddini er, gongd, úti á loftinum og tvey kømur. Kjallarin er óinnrættaður. Húsini standa væl fyri í friðarligum og barnavinaligum umhvørvi, skjótt til skúla og barnagarð, húsini eru væl hildin bæði uttan og innan, garður kring húsini og sera vakurt útsýni í allar ættir.

**Prísuppskot : 900.000,00 kr.**



### Tvíhús : Áarrás 7, Argir

Tvíhúsini eru í 2 hæddum hvør á 68 $m^2$ – í alt 136 $m^2$. Grundøkið er 300 $m^2$. Byggiár: 1989, men mangt ymiskt er gjørt við húsini, so tey eru sum nýggj. M.a. er niðasta hædd innrættað, innhurðar skiftar og ketil skiftur í 2006. Í neðra er inngongd, hall / garderoba, millumgongd, fýrrúm / vaskirúm, baðirúm, 2 størri kømur og 2 smærri kømur. Í erva er trappugongd / gongd, køkur / borðsstova / stova, baðirúm og 2 kømur. Harafturat er ovastaloft / goymslurúm. Íbúð kann gerast í neðra og inngongd kann gerast í erva. Harafturat kann garaga gerast. Húsini standa í náttúruvøkrum, veðurgóðum, friðarligum og barnavinaligum umhvørvi við blindan veg og hava gott útsýni. Stutt er til dagstovnar, skúlar, busssamband og nýggja ringvegin.

**Prísuppskot : 2.2 milliónir kr.**



### Íbuð – undir Kongavarða H1 th Argir

Væl dámda íbúðin undir Kongavarða á 102 $m^2$ er til sølu. Bert hendan eina er eftir í hesari støddini. Íbúðin, sum er í gerð, er sera snøgg, væl gjørd og úr besta tilfari. Harafturat er felagsøki. Hon er væntandi liðug várið 2009. Har er trappurúm / lyfta, inngongd, gongd / forstova / garderoba, baðirúm / vaskirúm, køkur, borðstova / stova við útgongd til svala, hjúnarrúm við útgongd til svala og kamar. Íbúðin liggur í friðarligum, náttúruvøkrum og barnavinaligum umhvørvi við góðum tilplantaðum felagsøki, spæliplássi, sparkivølli og góðum parkeringsøki. Íbúðin er á 1. hædd í blokki H til høgru. Afturat keypskostnaðinum skal leggjast út kr. 150.000,00 fyri mvg, ið keyparin kann søkja um at fáa endurgoldið.

**Prísuppskot: 1.538.710,00 kr.**



### Sethús – á Kirkjubø, Miðvágur

Góð sethús í tveimum hæddum við stórari garasju. Byggiár 1982 hvør hæddin 110 fermetrar, grundøkið 729 fermetrar. Á miðhæddini er gongd, køkur, borðs-stova/stova, hjúnarrúm, baðirúm og trý kømur. Húsini hava nýggjan køk, hvítvørur, eisini nýggjar innhurðar og baðirúmið gjørt av nýggjum við gosbað. Í kjallarainum er vaskirúm, eitt kamar og stór garasja við el. portri. Húsini standa væl fyri í friðarligum og barnavinaligum umhvørvi við blindan veg. Sera vakurt útsýni út á fjørðin og granni til kendu søguligu prestakonuna Barbaru. Húsini hava stóran garð, túnið og trappunar eru lagdar við flísum.

**Prísuppskot 1.6 milliónir kr.**



### Grundstykki – Brattalíð 19, Tórshavn

Grundstykki, sum liggur einastandi væl fyri, er 607 m2 til víddar og er væl egnað til at byggja m.a. tvíhús á. Vegur er til ognina.

**Prísuppskot : 1.6 milliónir kr.**



### Grundstykki – Grønalíð 19, Tórshavn

Grundstykkið matr.nr. 886ax, sum liggur heilt einastandi væl fyri í gangifjarstøðu frá býnum, er 494 m2 til víddar og er sera væl

**Prísuppskot : 1.3 milliónir kr.**



### Tvíhús – Norðskálavegur 17, Norðskála

Norðara helvtin av tvíhúsinum er nú liðug. Húsini eru í 2 hæddum – samlað búvídd umleið 180 fermtrar. Húsini hava Føroyaprofilklædning, svart alminiumstak, tætt tróður við dúki, plastikvindeygu og úthurðar. Innhurðarnar verða fyllingshurðar ( Finland), og gólvini á vesinum er sveisað vinyl. Í miðhæddini er durur, gongd, stova og køkur í einum við útgongd til altan, baðirúm við brúsu, við møðuleika fyri vaskirúmi, hjúnarrúm, 2 kømur og goymslurúm. Niðara hæddin er óinrættað, tað er møguleiki at gera trappuniðurgongd frá goymslurúminum.

**Prísur: 1.190.000,00 kr.**



### Virkisbygningur/sethús – Heiðavegur 72, Saltangará

Ognin er ein vælútgjørdur vinnubygningur í Saltangará í tveimum hæddum Hvør hæddin 140 fermetrar.Íalt 280 fermetrar. Grundøki 480 fermetrar. Byggiár 1960. Báðar hæddirnar verða sum nú er, nýttar til skrivstovuhølir. Í miðhæddini er durur, fyrrúm gongd, 2 skrivstovuhølir, wc og køkur. Í ovaru hæddini er gongd, wc og 3 skrivstovuhølir. Bygningurin er útgjørdur við el-, teldu- og telefoninnlegging. Ognin kann eisini nýtast sum sethús, og er løtt at gera til tvær íbúðir.

**Prísuppskot : 1.3 milliónir kr.**



### Sethús – R. C. Effersøesgøta 14, Tórshavn

Mitt í býnum í hugnaligum og vøkrum umhvørvi standa hesi snotiligu og væl hildnu húsini í 2 hæddum á uml. 90 m2 í hvørjari hædd – í alt 180 m2. Grundøkið er 394m2. Byggiár: 1945, men nógv er gjørt við húsini so við og við. Nøkur nýggj vindeygu eru, takið varð skift í 2000 og ketilin er frá 2006. Í erva er inngongd, gongd / garderoba, borðsstova / stova, matarkøkur, hjúnarrúm, baðirúm, kamar og trappugongd til niðaru hædd. Í neðra er inngongd, gongd, stova, køkur, wc, baðirúm, 2 kømur og vaskirúm / fýrrúm við egnari inngongd. Runt húsini er garður / urtagarður, ið er sera væl hildin. Húsini standa í veðurgóðum, friðarligum og náttúruvøkrum umhvørvi beint undir Kongaminninum. Allir hugsandi stovnar og handlar eru beint við hondina.

**Prísuppskot : 2.1 milliónir kr.**



### Randarhús – Millum Gilja 71, Hoyvík

Stór randarhús við tveimum íbúðum og bilskúri til tveir bilar. Hvør íbúð er uml. 80 fermetrar, harafturat hevur íbúðin á aðru hædd stórt loft sum kann innrættast. Húsini eru væl hildin, bygd 1986. Íbúðin á veghæddini hevur inngongd, gongd, vaskirúm, køkur/stova út í eitt, hjúnarrúm, kamar og baðirúm, altanhurð er út í garðin. Ovara íbúðin hevur inngongd, dur, trappu upp, gongd, køkur/stova út í eitt, hjúnarrúm, 2 kømur og baðirúm, altanhurð út í garðin. Á loftinum eru vindeygur sett í. Dekk er millum hæddirnar og brandmúrur til báðar síðir. Húsini eru væl hildin og liggja í hugnaligum og barnavinarligum umhvørvi, við urtagarði og góðum sólagangi. Beint við dagstovn og gøtu yvir til Hoyvíkar skúla. Húsini liggja frítt fyri, gott útsýni, helst frá ovari íbúðini. Ognin verður seld sum eitt hús við tveimum íbúðum ella hvør íbúð sær.

**Prísuppskot: 2.2 milliónir kr.**





### Sethús – Torbjarnargøta 1, Norðragøta

Snotiligu arkitektteknaðu húsini eru í 2 hæddum. Ovara hæddin er 164$m^2$ og niðara hæddin er 40$m^2$, afturat hesum er ein garasja ið er 36 $m^2$ - í alt 240 $m^2$. Grundøkið er 740 $m^2$. Byggiár: 2002. Í ovaru hæddini, sum er deild upp í 2 partar, er durur, køkur/stova, sjónvarpsstova, wc, 2 kømur, kantór, hjúnarrúm við egnum baðirúmi og trappa til niðaru hæddina. Eisini er stór terassa. Í niðaru hæddini er gongd, kamar, baðirúm, brúggers/fýrrúm og haðani inngongt til garasjuna. Húsini eru gjørd av sibiriskum lerki, hava aluminiums vindeygu við herðaðum glasi uttan og takið er tjørupapp. Húsini standa í friðarligum, veðurgóðum og barnavinaligum umhvørvi og hava sera gott útsýni. Stutt er til allar hentleikar. Húsini eru vilíkahaldsfrí.

**Prísuppskot: 2.5 milliónir kr.**

### Virkisbygningur – Oyravegur 16 Oyri

Talan er um fleiri bygningseindir, m.a. er framleiðsluhøll til skeljaframleiðslu íroknað skrivstovuhølir og starvsfólkarúm, framleiðsluhøll til rækjudráttir og høll við uml. 6.000 m3 frostgoymslu. Samlað gólvídd er um. 3.626 fermetrar. Harumframt eru eini sethús, gólvídd 255 fermetrar og smiðjubygningur íroknað fólkarúm, samanbygdur við garasju til trukkar, gólvídd uml 400 fermetrar, somuleiðis er pláss fyri framhaldandi útbyggingum. Møguleiki er at keypa alt undir einum ella einstakar partar. Eisini er møguleiki at gera leiguavtalu fyri verandi virksemi. Bygningarnir lúka heilsufrøðislig krøv, væl egnað til góðsking av aliúrdráttum, pelagiskan fiski t.v.s. alla matvøruframleiðslu við høgum heilsufrøðsligum krøvum. Bygningseindirnar eru allar í góðum standi, ongar átrokandi ábøtur ery neyðugar. Liggja á ídnaðarøki/havnaøki við kajkanti á Oyri, ið er ein djúphavn, soleiðis at stór skip kunnu leggja til. Øll uttanumsøkir eru javnað og stoypt/asfalterað. Bygningarnar liggja sera væl fyri í miðstaðarøkinum, sami teigur annahvørt tú kemur frá Skálafjørðinum, Klaksvík, Vágunum ella Havnini. Ognirnar verða seldar um hóskandi boð verður givið



### Sethús – Tinghúsvegur 44-46, Tórshavn

Nú eru tvær áhugaverdar ognir við framtíðarmøguleikum mitt í býnum til sølu. Ognirnar liggja í 2. grundumráði, har byggistigið kann fara upp til 0,5 við kjallara, 2 hæddum og lofti. Húsini, ið standa á ognunum eru í vánaligum standi. Alt má setast í stand og høvuðsumvælast, ella rívast niður og byggjast upp av nýggjum. Ognirnar liggja sera væl fyri í miðbýnum í friðarligum, veðurgóðum og hugnaligum umhvørvi og hevur gott útsýni. Allir hugsandi stovnar og handlar eru beint við hondina. Ognirnar (matriklarnir) kunnu seljast saman ella hvør sær. Ognirnar verða seldar, um hóskandi boð fæst.

P/F inni • Niels Finsens Gøta 37
P.O. Box 364 • FO-110 Tórshavn
inni@inni.fo • Tlf. 35 42 00 • Fax 35 42 01

inni